## Bókmentavirðisløn M. A. Jacobsens:

# Virðislønirnar handaðar

**Hósdagin 19. oktober vóru mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs 2006 verða handaðar í Müllers Pakkhúsi**

MENTAN
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Hátíðarhald var í Müllers Pakkhúsi hósdagin 19. oktober, tá mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs vórðu handaðar.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, beyð øllum at vera vælkomnum og segði m.a. frá søguni um M.A. Jacobsens virðislønirnar. Tað var í januar 1958, at skaldið Tummas Napoleon Djurhuus, fyri Rithøvundafelag Føroya heitti á Tórshavnar býráð, um at seta á stovn eina árliga bókmentavirðisløn, av tí – sum sagt var í skrivinum – at so syndarliga lítið verður gjørt fyri bókmentir her á landi.

Rithøvundafelagið skeyt upp, at virðislønin skuldi bera navn eftir mentamannin Mads Andrias Jacobsen, ið hevði avrikað so nógv til frama fyri henda bý.

Býráðið tók væl ímóti hesi áheitan frá nýstovnaða Rithøvundafelagnum, og samtykti at seta ein hóskandi minnisvarða yvir fjøltáttaða býráðsformannin Mass á Húsum, ið hevði verið miðdepilin í føroyska bókmenta- og mentanarumhvørvinum.

Longu sama ár – í 1958 – vórðu latnar virðislønir úr grunninum, sum fekk heitið: Bókmentavirðisløn M. A. Jacobsens.

Tey sum fingu virðislønir fyi 2006 vóru: Steintór Rasmussen, Guðrun Gaard, Ebba Hentze og Carl Jóhan Jensen.

**Steintór Rasmussen** fekk Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs fyri hugskotið og útgávuna "Kular Røtur" við hesum grundgevigum: *Øll børn í Føroyum kennast við hugtakið Kular Røtur. Hetta eru beinraknir barnasangir við stuttligum og ævintýrkendum innihaldi, ið bera upp á rím. Løgini eru ljómandi og leikandi løtt. Innihaldið er núligt og ganga orð, myndir og tónleikur í eina heild, sum hóvar børnunum væl. Steintór Rasmussen hevur við útgávuni Kular Røtur sýnt listarligt hegni og fingið fram sanggleðina hjá okkum øllum, smáum sum stórum*

**Guðrun Gaard** fekk M.A. Jacobsens virðisløn fyri yrkisbókmentir við hesum grundgevingum: *Við væl úr hondum greiddu ritgerðini „Far fram á torg“ hevur Guðrun lýst, hvussu tvinnir tvídráttir, øðrumegin millum føroyska uppvøksturin og lívslongu útisetuna, hinumegin millum eldri føroyskar yrkjarar og modernaðan evropeiskan skaldskap, hava verið tað jørðildið, sum yrkingar Regin Dahls eru sprotnar úr. Á greiðan og hugtakandi hátt vísir ritgerðin, hvussu tráanin eftir at greiða tilverunnar stóru spurningar er drívmegin í ritverki Regins, og hvussu Regin í hesi tráan støðugt mennir sítt egna skaldsliga mál. Við at seta viðgerðina í samband við dialogiskt ástøði hevur Guðrun givið okkum eina dygga bókmentaliga viðgerð og nýtt innlit í skaldskapin hjá einum av okkara mætastu skaldum.*

**Ebba Hentze** fekk M.A. Jacobsens fyri mentanaravrik við hesum grundgevingum: *Alla sína tíð hevur hon livað við bókum og skaldskapi. Hon er ein tann royndasti metarin av bókmentum, vit eiga, og hevur dugað, djørv og beinrakin, at sagt sína hugsan. Sum rithøvundur hevur Ebba verið nýskapandi, men tað er sum týðari av okkara skaldskapi í onnur mál, hon hevur havt sín heilt serstaka týdning. Meira enn nakar annar hevur hon skapað føroyskum bókmentum og føroyskum rithøvundum eitt beinleiðis samband út í ein størri og víðari heim.*

**Carl Jóhan Jensen** fekk M.A. Jacobsens virðisløn fyri fagrar bókmentir fyri verkið „Ó-, søgur um djevulskap“ við hesum grundgevingum: *Hetta er ein evropeisk søga úr 19. og 20. øld, sum letur ljós sítt falla á skuggasíðurnar í mannasálini. Høvundurin vísir í hesari bókini eitt skaldsligt kynstur, sum ikki stendur aftan fyri tað framkomnasta í okkara tíð. Margfeldi í máli og frásagnarlist og eitt stílkynstur, tikið úr leikum, tølir lesaran og skapar vakurleika í hesari søguni, ið er full av óunnileika. Høvundurin ger bæði í senn:*



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, handar Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs til Steintór Rasmussen*



*Martha W. Dalsgaard syngur "Heimamynd" hjá M.A. Jacobsen. Bo Isholm spælir gittar og Stamin Stanchev harmoniku*